# Kaffihugni á Resturant Fortuna

*Anja Andreasen*



TÍÐINDASKRIV

Mánakvøldið heldur Anja Andreasen, Cand.Phil. í søgu og siðsøgu, fyrilestur um uppruna og søgu Sambandsflokksins, á Resturant Fortuna.

Mánakvøldið 17. mars heldur skipar Norðoya Sambandsfelag fyri kaffihugnað á Resturant Fortuna.

Tiltakið byrjar kl. 21:00 og á skránni er kunning um tað aktuellu politisku støðuna og ein fyrilestur um søgu og uppruna sambandsflokksins.

Eisini verður felagssangur og burturlutan.

**Fyrilesturin hjá Anju**

Anja sigur at tað er sera áhugavert at lesa um tey mál sum vóru á polittisku dagsskránni tá Sambandsflokkurin bleiv stovnaður í 1906.

Ein kann siga at avhaldsspurningurin hevði minst líka stóran týdning í orðaskiftinum sum sjálvstýrisspurningurin.

Eisini hevur ofta verið víst á at sambandsflokkurin var stovnaður sum ein høgraflokkur, men tað er sera ivasamt hvussu aktuellur hesin spurningurin var í 1906.

**Fráhalds og brennivínsflokkar?**

Anja Andreasen sigur at tað vóru serliga avhaldsmenn sum vóru við til at stovnað Sambandsflokkin og tað er sera áhugavert at lesa um hvussu stóran týdning hetta hevði fyri flokkin á fyrstan tíð.

Í politiska orðaskiftinum um tað mundi tá Sambandsflokkurin bleiv stovnaður, varð av álvara tosað um at stovnað avhaldsflokkar og brennivínsflokkar.

Tiltakið sum Norðoya Sambandsfelag nevnur "Kaffihugni" er ókeyps og øll eru hjartaliga vælkomin.

**Norðoya Sambandsfelag**

John W. Joensen formaður, Karl Olgar Joensen næstf., Erikka Eltør kassameistari, Elisabeth Joensen (Betta) skrivari og Poul Juul Vilhelmsen nevndarlimur.

## Minningarorð um

# Katrinu Rasmussen

## vanliga nevnd Dinna,

fødd 13. september 1945 - deyð 27.08.2002



Nú er longu nakað síðani, at Dinna fór hiðani, men eg ynski at seta nøkur orð á blað um ymist, sum er seti í samband við minnið um Dinnu.

Vit starvaðust í somu fyritøku í fleiri ár, og hóast vit ikki sum so arbeiddu tætt saman, við tað at fyritøkan er stór, og vit starvaðust á hvør sínari deild, so tosaðu vit mangan saman.

Tað eyðkenda við Dinnu var hennara friðarliga, blídliga lyndi, hon leyp ongantíð framav, men gav sær stundir at lurta bæði í samskiftinum við starvsfelagar og í sínum arbeiði, og viðskiftafólkini kendu seg væl, tí tey merktu, at hon veruliga tók tey í álvara og ikki gavst, fyrrenn uppgávan var loyst. Hon var álítandi og nærløgd og sera fryntlig at tosa við.

Tað var tó kanska mest í hugnaløtum - kaffipausunum og tiltøkum, sum arbeiðsplássið ella starvsfólkið skipaði fyri til at stuðla upp undir tað sosiala veðurlagið, at eg mest kom at samskifta við Dinnu. Tað blíða og fyrikomandi sermerkti hana ikki minst slíkar løtur, og hon var ein ‘veitsluleyva’ í positivum týdningi. Tosaði, lurtaði, skemtaði, sang, flenti, dansaði. Tá livdi hon mitt í verðini og gav hvørjari veitslu ella samkomu eitt eyka pift. Hon var so væl uppløgd, ein merkti, hvussu góð hon var við øll, hvussu hon kendi, at øll vóru hennara vinir, og hvussu hon hugnaði sær saman við sínum feløgum.

Vit vóru nakrar á arbeiðsplássinum, sum gjørdust góðar vinkonur, ein kjarni, sum tosaðu serliga væl saman, - Edna, Finngerð, Meinhild, Vivi, Heidi, Bjørg og undirritaða, og saman við okkum var Dinna.

Áðrenn Dinna gjørdist sjúk, var ikki sørt, at vit øvundaðu henni, tí hon als ongar trupulleikar tóktist hava. Hon var vøkur, bar seg væl, klæddi seg væl og tóktist hava ráð til alt. Kanska hevði hon problem, men hon tosaði so ikki um tey. Hon hevði eitt gott bakland, ein mann, sum bar hana á lógvum, børn og ommubørn, sum skikkaðu sær væl og vóru góð við hana, og hon visti ikki alt tað góða, hon skuldi gera fyri tey. Hon hevði eitt gott og hugnaligt heim har í Tjarnardeild og annars alt tað, sum kann skapa eitt trygt og gott lív. Dinna hevði eitt gott lív.

Eg setti stóran prís upp á Dinnu, og eftir at hon var vorðin sjúk, undraðist eg mangan um, hvussu róliga og positivt hon kundi tosa um sjúkuna. Ikki tað at hon bagatelliseraði, men hon greiddi róliga og sinniliga og jarðbundið frá, hvussu hetta ella hitt hevði verið, hvussu tað hevði kenst. So eiðasørt hon gramdi seg. Hevði okkurt verið ringt ella strævið, so segði hon tað við einum gátuførum smíli til at taka broddin av frásøgnini. Hon var mangan burturi, bæði úr arbeiðinum og burturi til kanningar og viðgerðir, men sjálvdan var, at tú ikki hevði hesa sannføringina um, at hon væntaði at gerast frísk aftur.

Vit, vinkonurnar, tosaðu mangan um og undraðust á, hvussu sterk hon var, hvussu viljasterkt og treiskt hon hevði barst ímóti sjúkuni í fleiri ár, hóast hon annars var bæði lítil og nett og ikki var herd av mótgongd.

Eftir at eg sjálv var farin úr starvinum, tosaðu vit ikki so ofta saman, men eg frætti regluliga um hennara støðu - oftast frá Meinhild, sum var hennara serstaka vinkona og var nógv um Dinnu heilt til tað seinasta.

Nakrar ferðir hitti eg hana, hon bjóðaði mær heim at vitja, men hóast ætlanin var góð nokk, varð hetta bert gjørt ta einu ferðina. Dinna var bæði blíð og týð, hevði gjørt okkurt gott til reiðar og vartaði upp, hóast hon orkaði lítið. Vit tosaðu um ymist, komu eisini inn á teir ævigu spurningarnar, og hon segði, at hon hevði sett sær fyri, at hon skuldi í kirkju so leingi, hon orkaði, og so ofta, hon hevði høvi til tað. Hon visti, hvar hjálp og uggi vóru at finna.

Saman við hinum á liðinum, sum nú telur tvær minni - Dinnu og Heidi, sum andaðist í desember 2001 - vil eg bera eina heilsan til tín, Sjúrð, og til børnini og ommubørnini hjá tykkum. Ein kann bara ímynda sær tað stóra, tóma plássið - og drýpa høvur. Dinna var ein kvinna, sum vit høvdu stóra virðing fyri, og sum vit minnast við takksemi. Harrin signi tykkum øll.

**Ása**

PRIX

NR. 51 • FRÍGGJADAGUR • 14. MARS 2003 • 77. ÁRGANGUR • WWW.SOSIALURIN.FO

**Finalan**

Finalan í Prix Føroyum verður í Norðurlandahúsinum í Havn leygarkvøldið 26. apríl. Seks bólkar fara at spæla, og tá skal endaligi vinnarin í kappingini finnast.

Fimm finalubólkar eru funnir. Teir eru MC Hár, Déjá Vu, Braquet, Makrel og Hatespeech.

Sætti finalisturin skal finnast í hálvfinaluni leygarkvøldið. Valið stendur ímillum: Headache Blues Treo, Fluffy Toys, Gestir, Lawetz og Mind's Eye.

Finalan í Prix Føroyum verður send beinleiðis í Útvarpinum og Sjónvarpinum, og eisini íslendska Rás 2 ætlar senda frá finaluni.

# Fimm bólkar eru um boðið



*Einar Joensen og hinir í Fluffy Toys skulu leygarkvøldið spæla í seinasta undanumfarinum í Prix Føroyum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Leygarkvøldið er seinasti møguleikin at spæla seg í ársins Prix Føroyar finalu. Fimm bólkar, sum spæla ymiskan tónleik og hava ymiskar styrkir, fara at kappast um sætta finaluplássið. Trupult er at peika á nakran greiðan favoritt**

HÁLVFINALA

*Eyðun Klakstein*

Fimm bólkar, sum hava verið hálvir vinnarar, bresta leygarkvøldið saman í seinasta undanumfarinum til Prix Føroyar.

Bólkarnir hava longu spælt einaferð í kappingini, og tá gjørdust teir nummar 2 í sínum innleiðandi umfar. Eitt gott úrslit, men uttan trygd fyri eitt av teimum seks finaluplássunum.

Leygarkvøldið skal arbeiðið gerast liðugt. Fýra bólkar verða sendir úr kappingini, meðan tann eini fær gylta ferðaseðilin til finaluna.

### Tveir eitt vet betur

Tað er trupult at peika á nakran greiðan favoritt til seinasta finaluplássið, men skulu avrikini í innleiðandi kappingunum leggjast til grund fyri eini varisligari meting av, hvørjir bólkar kanska eru eitt vet frammanfyri hinar, so mugu Headache Blues Treo og Gestir togast upp úr hattinum.

Tað verður trupult hjá einum og hvørjum bólki í Prixnum at kappast reint tónleikaliga við garparnar í Headache Blues Treo. Í hesum bólki spæla nakrir av Føroya bestu og mest royndu tónleikarum, og teir fáa blues-tónleikin rættiliga upp at svinga.

Men blues-tónleikurin er rímiliga traditionellur, og tí kann vælspælandi bólkurin Gestur stinga seg fram um, verða teir eins góðir leygarkvøldið, sum teir vóru fyri eini lítlari viku síðani.

### Hinir tríggir

Hinir tríggir bólkarnir, sum verða við leygarkvøldið, hava eisini gjørt tað gott í kappingin, og teir hava sínar serligu styrkir, sum kunnu senda teir alla vegin í finaluna.

Mind's Eye kom sum ein óvæntað hvirla inn á Prixpallin við ágangandi rocktónleiki. Bólkurin, sum als ikki hevði spælt alment áður, gjørdi rættiliga vart við seg og hevur hildið grýtuni á kók við fleiri framførslum seinastu vikurnar.

Lawetz vóru í nakað somu støðu – ókendir og ungir. Men teir kláraðu eisini at sannføra dómararnar um sínar tónleikaligu dygdir, og tann nakað bleytari rocktónleikurn fall væl í oyra.

Fluffy Toys hevur verið nakað fyri seg í hesum Prixnum. Bólkurin er sera væl samanspældur, og teir duga at fáa lív í við tí svingandi klassiska rocktónleikinum, sum teir spæla so frágera væl.

### Ein vinnari

Tað kann bara ein av hesum bólkum koma í finaluna í Prixnum, men umfarið leygarkvøldið er ein hálv finala, og bólkarnir fáa enn eitt høvi at gera vart við sínar tónleikaligu dygdir.

Tí nýtist eingin at sita eftir sum vónbrotin tapari, men veruleikin er ivaleyst, at eitt finalupláss hevur nógv at týða, nú bólkarnir eru komnir so lang.

Leygarkvøldið fellur avgerðin, og tá verður finalan í Prix Føroyum 2003 fullmannað.